


**Nr. 11** ***26. mai 2024*** **84. árg.**

# Prógva kærleika tín við altarið!

*„Flýggið hordómin!“ 1. Kor. 6,18.*

Ann Landers blaðstjóri skrivar: „Um ein maður biður teg prógva kærleika tín við at dríva hor við honum, so skalt tú siga: „Hatta er sum at biðja meg prógva kærleikan við at stinga høvdið inn í ovnin og tendra gassið, ella at leypa beint út fyri ein bil. Tað er so at siga líka trygt. Sópa hasa eiturkoppanótina út úr høvdinum á tær!“

Ein og hvør, ið biður teg prógva tín kærleika, heldur teg vera størsti og mest góðvarni býttlingur, nakar hevur sæð. Hetta orðið „prógva tað“ er mest rotna útsøgn, sum nakrantíð er søgd.

Elskar hann teg? Tað ljóðar ikki so. Ein, sum elskar teg, vil tær tað allarbesta. Fá tað inn í høvdið! Hann, sum biður um prógv, vil, at tú skalt taka lut í eini ómoralskari gerð, missa títt sakloysi, oyðileggja tína muru, missa tína sjálvsvirðing, seta teg í váða at missa títt góða umdømi og gerast upp á vegin ella koma í trupulleikar. Lat eyguni upp! Hann vil tað best fyri seg sjálvan!! Hann vil hava eina spennandi uppliving, og seinni kann hann reypa av tí, meðan tú mást svíða fyri tað. Kærleiki? Álvaratos, hvør lumpar hvønn? Ein drongur, sum elskar eina gentu, vil heldur missa sín høgra arm enn gera henni ilt.

Sannleikin er tann, at hetta sjálvgóða menniskjað hevur prógvað, at hann als ikki elskar teg. Lætt er at spáa um eftirspælið, og tá roynir Don Juan altíð at strúka burtur síni spor. Tað er, tá ið hann vrakar teg, dregur nót sína inn og blakar hana út aftur at fanga ein annan líka góðvarnan fisk. Um hann elskar teg, lat hann so prógva tað – framman fyri altarinum.“

*„...et Ord til Dagen“* – *Effie Campbell* umsetti.

# Diakoni – at vera eitt medmenniskja

*Aril Edvardsen*

Omma segði altíð: „Den største gleda ein kan ha, det er å gjera andre glad.“ Tað er at vera medmenniskja, og tað er tað mest innihaldsríka lívið, sum finst. Men brúkar tú meginpartin av tíðini upp á teg sjálvan, so gerst lívið strævið og negativt.

Eg haldi meg vita, hví eg livi. Hvønn morgun, tá ið eg sleingi beinini út um songarstokkin, veit eg meiningina við lívinum, og hví eg eri skaptur. Sjálvgóðskan hugsar bara um seg sjálva og ger okkum kensluleys og sjálvglað.

Men um vit eru medmenniskju, so skilja vit tað týdningarmesta av øllum: Gev, tak ikki bara ímóti. Vit hava fyri neyðini at taka ímóti, t.d. tá ið vit eru sjúk, ella vit hava onkran tørv; men um vit bara hugsa um at fylla okkum sjálv, tá gerast vit negativir ódugnakroppar.

Lívið kann gerast eitt stórt minus, um einki er aftanfyri. Men kærleiki Guds, borin fram ígjøgnum Jesu kross, ger, at lívið kann umbroytast til eitt pluss. Tvey sløg av fólkum eru til, tey positivu, sum síggja møguleikarnar, og tey negativu, sum síggja alt sum ógjørligt. Tað valdast, hvar ið tú setir orðið „men“.

Í dag ræður hin ein-dimensjonala veruleikafatanin í verðini, har menniskjan er í miðdeplinum. Mong hava hesa skeivu fatanina. Í veruleikanum eru tríggjar dimensjónir: **1.** Gud – ein góð makt. **2.** Djevul – ein ónd makt. **3.** Menniskjan og tann materiella dimensjónin.

Um vit skulu rokna víddina á einum sirkli, so mugu vit brúka rætta frymilin: radius falda við radiusi falda við 3,14 fyri at fáa rætta svarið. Rokna vit við 2,14, gerast øll svør skeiv. Skulu vit loysa teir ræðuligu dagligu trupulleikarnar hjá mannaættini við einari ein-dimensjonalari, sekulerari, humanistiskari veruleikafatan, fer tað ongantíð at eydnast hjá okkum, hóast ómetaligar penga-innspræningar og alla upplýsing. Bara tá ið vit hava eina trídimensjonala veruleikauppfatan kunnu vit loysa okkara persónligu og heimsins trupulleikar.

Tí at Hin góða Maktin, Gud, er nær allastaðni. Tí er tað so týdningarmikið, hvaðani vit tappa streymin úr. Krossurin er miðdepilin í alheiminum. Krossurin umboðar kærleika og fyrigeving, sum í roynd og veru merkir nýggjar møguleikar og kjansir. Vit gera øll skeivt av og á. Tí tørvar okkum at hava

samband við ta positivu kraftina í universinum, Gud. Hann lærir okkum at tæna øðrum, og tað er meiningin við lívinum.

Eg kann vera saman við fólki, sum hava allar møguligar lívsáskoðanir, ikki av tí at eg eri nakar vingliskøltur, men av tí at eg eri tryggur. Um tú ikki ert grundfestur í trúnni, so mást tú halda teg innan fyri veggirnar í missiónshúsinum. Um tú skal vera frælslyntur, so mást tú vera tryggur í tí, sum tú trýrt á.

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus loysir og setir í frælsi

*Kenneth Hagin*

*„Andi Harrans er yvir mær, av tí at hann hevur salvað meg, til at bera fátækum gleðiboð. Sent hevur hann meg út til at boða* **fangum frælsi** *og blindum sjón, til at* **sleppa neyðstøddum leysum**, *til at kunngera eitt Harrans náðiár.“ Luk. 4,18–19.*

Eg fekk eitt bræv frá einum manni, sum hevði verið á einum møti, sum eg hevði í Phoenix í Arisona fyri mongum árum síðani. Hann nevndi, at hann hevði verið offiserur í herinum hjá USA. Tá ið møtini í Phoenix vóru, var hann farin frá við eftirløn og var júst útskrivaður av veteransjúkrahúsinum fyri triðju ferð. Hann hevði verið innlagdur, av tí at hann royndi at sleppa sær av við alkoholtrupulleikar sínar. Men hann helt á at drekka. Hann var eisini sjálvboðin innlagdur á trý ymisk privat sjúkrahús fyri at royna at kvetta við alkoholtrupulleikarnar.

At enda fór hann niður á síni knø og fór at biðja. „Harri, eg kendi teg, tá ið eg var ungur. Tak meg aftur. Eg eri ein fráfallin. Fyrigev mær. Sum hin burturvilsti sonurin komi eg heim aftur.“

Eftir at hann hevði biðið, rullaði byrðan av honum sum ein tungur sekkur. Men hann var framvegis bundin av alkoholi. Hann megnaði ikki at steðga at drekka. Ein vinmaður segði honum um møtini, ið vit høvdu í Phoenix. „Tað er ein fyrr-verandi baptistatrúboðari har, sum leggur hendurnar á fólk,“ segði hann. „Tey verða grødd og loyst.“

Hann kom á møtið og leitaði sær hjálp. Eg legði hendurnar á hann. Eitt ár seinni hoyrdi eg frá honum. „Síðani ta ferðina havi eg ongantíð nortið ein dropa av alkoholi. Eg havi ei heldur havt hug til tað,“ segði hann.

Í brævinum, hann sendi mær seinni, segði hann, at nú vóru átta ár komin og farin. Hann skrivaði: „Guds kraft kom

yvir meg og fór sum ein eldur gjøgnum kroppin á mær og rak alkoholdjevulin beint út úr kroppinum á mær. Eg eri ongantíð dottin útí aftur øll hesi árini.“

Er hatta ikki akkurát líkt Jesusi? Hann vil hjálpa fólki.

Jesus kom at seta menniskju í frælsi. Hann kom at grøða og seta menniskju í frælsi. Takk, Jesus, at tú gavst lív títt, so at eg kann vera loystur og fríur!

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Ein kona vitnaði:** „Lindin var frá, og eg hoyrdi eina andakt, sum endaði so: Alt hetta hevur Jesus gjørt fyri teg. Hvat hevur tú gjørt fyri hann? Tá segði eg hart fram fyri meg: Eg havi einki gjørt fyri hann, men ... eg kundi lagt av at roykt. Í somu løtu varð eg loyst frá nikotintrongdini. Eg havi aldri roykt síðani, ei heldur havt hug til tað.“

*e.c.* ums.

---

Tú kanst **ikki** ofra pengar og so halda, at tú sleppur undan at vera **vitni**! **Vilt** tú vera vitni, **vilt** tú vera ein Jesu lærusveinur?

*e.c.* ums.

---

Ein, sum leitaði eftir meining við lívinum, royndi at lesa filosofi; men hann sá skjótt, at tað var ikki svarið. Filosofi eru menniskja orð, men Bíblian er Guds orð. Har liggur allur munurin.

*e.c.* ums.

---

Materialisman tekur tankarnar á foreldrunum burtur frá børnum sínum. Tí verður ungdómurin latin eftir í einum tómrúmi. Jesus Kristus og hansara máttur og megi kann geva teimum nýtt lív. Hann kann eg viðmæla.

*e.c.* ums.

---

Tá ið Elisa skuldi skiljast frá Eliasi, bað hann um at fáa ein dupultan lut av tí anda, ið hvíldi yvir Eliasi. Um tú telur undrini, ið Elias upplivdi, vóru tey 8 í tali; men Elisa upplivdi 16 undur. So hann fekk sanniliga ein dupultan lut.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 26. mai | **Tekstur:** | Áps. 2, 40–47 | **Bíbliuorð** | Gal. 2,20 |
| 2. juni | **Tekstur:** | Áps. 3,1–11; 4, 7–10<br>og 1 Kor 12,4–6 | **Bíbliuorð:** | Sl. 13,6 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 12** *9. juni 2024* **84. árg.**

# Ævinleikaútlitini

„…við tað at vit ikki líta at hinum sjónliga, men hinum ósjónliga, tí at hitt sjónliga er tímiligt, men hitt ósjónliga ævigt.“
*2. Kor. 4,18.*

Tað at trúgva á Jesus er hin djúpasta meiningin við lívinum. Hann er heimsins vón. Hann kom ikki inn í henda heim at døma hann; men hann kom at frelsa hann.

Hetta síðsta kristna ættarliðið her í Vesturheiminum hevur so púra mist ævinleikaútlitini, og hvat ið ein sál er verd.

Skriftin sigur: „Vit líta ikki at hinum sjónliga, men hinum ósjónliga, tí at hitt sjónliga er tímiligt, men hitt ósjónliga ævigt.“ 2. Kor. 4,18.

Jesu ævinleikaútlit hava mangir av hansara eftirfylgjarum mist. Hann sigur: „Tí at hvat gagnar tað manni, um hann vinnur allan heimin, men má bøta afturfyri við sál síni? Ella hvat skal maður geva í viðurlag fyri sál sína?“ Matt. 16,26.

Vit hava øll ein trupulleika mótvegis Gudi, av tí at vit øll hava syndað. Vit hava ein trupulleika, sum Jesus loysti, tá ið hann hekk seks tímar á krossinum. Har díkti Faðirin hann undir í allari heimsins synd, so hann fekk frelst teg, fyrigivið tær og givið tær eitt nýtt lív.

Vit tryggja bæði hús, bil, bát, kettu og hund; men mong gloyma at tryggja ævinleikan. Har tú ert staddur um hundrað ár, ert tú eisini staddur um tvey hundrað ár. Áðrenn tú leggur hetta blaðið saman, kanst tú fáa trygdina fyri, at navn títt verður skrivað inn í Lívsins Bók hjá Gudi í Himli. Hesa trygdina fært tú við at trúgva á Jesus og á tað, sum hann gjørdi á krossinum.

Tá ið tú hevur bjóðað honum inn í títt hjarta sum Harra og Frelsara, skalt tú dagliga „mata“ tína trúgv – tú skalt dagliga lesa í Guds Orði. Peika síðani øðrum á Jesus, tí tey hava eisini eina ódeyðiliga sál.

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds orð eru sterk í okkara munni

Størsta uppdagingin, eg havi gjørt, er, hvussu sterk Guds orð eru í mínum munni. Orðt. 18,21 sigur: „Deyði og lív eru í tungunnar valdi, og tann, sum hevur teym á henni, skal njóta frukt hennar.“

Í fyrstuni skilti eg ikki hatta, men eg havi bara upplivað, at tað virkaði, tá ið eg gjørdi, sum orðið segði.

Jesus sigur í Matt. 16,19: „Eg vil geva tær himmiríkisins lyklar, og tað, sum tú bindur á jørð, skal vera bundið í himli, og tað, sum tú loysir á jørð, skal vera loyst í himli.“ Harumframt stendur í Matt. 18,18: „Sanniliga sigi eg tykkum: Tað, sum tit binda á jørð, skal vera bundið í himli; og tað, sum tit loysa á jørð, skal vera loyst í himli.“

Hesi skriftstøð saman við øðrum, sum siga, hvat ið eg skal siga og trúgva, vátta hetta, sum t.d. Mark. 11,23: „Sanniliga sigi eg tykkum: Tann, ið sigur við hetta fjallið: „Lyft teg upp og kasta teg í havið,“ og ikki ivast í hjarta sínum, men trýr, at so verður, sum hann sigur, tá skal tað verða honum fyri.“

Hesi skriftstøð rætt og slætt brustu í sinni og hjarta mínum, so eg fór beinanvegin undir at gera eftir teimum. Eg upplivdi, at tá ið eg talaði út Guds orð í Jesu Kristi navni, hendi yvirnatúrlig ting. Eg loysti út slíkt, sum okkum tørvaði: hús, bil, pengar og frelsu fyri menniskju.

Tá ið eg skuldi fara inn á vertshús og kaffistovur at vitna um Jesus, bant eg djevlar og demonir, áðrenn eg steig innum. Seinni upplivdi eg, at hetta eisini riggaði á landamarkunum, tá ið eg skuldi inn um jarntjaldið at smugla Bíbliur og bókmentir, sum ikki vóru loyvdar í kommunistalondum.

Eg talaði bara hesi orð út: „Í Jesu Kristi navni bindi eg allar maktir og myndugleikar á hesi marknaeftirlitsstøðini. Eg proklameri, at Jesus er Harri á hesum staði.“ Tað riggaði hvørja ferð. Sum oftast kannaðu tollararnir meg ikki, og um teir kannaðu meg, so vóru eygu teirra blindað, so at teir sóu

ikki Bíbliurnar og onnur ting, sum eg smuglaði inn. So gav eg Harranum alla æru fyri hetta.

Tað er av líka stórum týdningi, tað, sum vit IKKI skulu siga. „Tá segði Harrin við meg: Sig ikki: Eg eri so ungur! Men far allar staðir, hvar eg so sendi teg, og tala alt tað, sum eg bjóði tær.“ Jer. 1,7. Hví skulu vit ikki siga tað negativa? Tí tað, sum vit endurtaka, fer beint inn í anda okkara, og hann trýr øllum tí, vit siga, og hann syrgir fyri, at tað, vit siga og endurtaka, hendir.

Vit skulu tala um tað, sum ikki er til, sum var tað til. Róm. 4,17. Vit skulu siga: „Av sárum hans fingu vit heilsubót.“ Jes. 53,5. Tá ið eg eri troyttur, sigi eg: „Gud gevur hinum troytta kraft og hinum máttleysa mikla styrki.“ Jes. 40,29 V.D. Tá ið mær tørvar okkurt, og eg eri illa staddur, sigi eg: „Gud mín skal eftir ríkidømi Sínum fylla alla trongd tykkara í dýrd í Kristi Jesusi.“ Fil. 4,19 V.D.

*Effie Campbell* umsetti.

# Sum dómur Sálomons

*„Tá vaknaði móðurkærleikin hjá henni, sum átti tað livandi barnið; og hon mælti: »Hoyr meg, harri mín; men gev henni tað livandi barnið og drep tað tó ikki.« Men hin mælti: »Hvørgin okkara eigur at fáa tað! Høgg tað sundur!« Tá tók kongur til orða og mælti: »Gevið henni barnið, ið livir, og drepið tað tó ikki; tí at hon er móðir tess!«„*
*1. Kong. 3,26–27.*

Fyri árum síðani kundi tú í amerikanskum bløðum lesa um eina sjáldsama hending, sum var farin fram í Buenos Aires í Argentina, og hana vil eg endurgeva her:

Har búði ein ógvuliga ríkur handilsmaður, sum átti eina ta bestu skóbúðina í býnum; men maðurin var deyðasjúkur.

Hann lá í songini og hevði ikki bara sína ringu sjúku at hugsa um. Hann gramdi seg nógv um báðar synir sínar. Teir arbeiddu báðir í skóbúðini. Av einari ella aðrari orsøk vóru teir blivnir óvinir, og teir kundu ikki torga hvør annan.

Nú skuldi tú hildið, at deyðasjúkan hjá pápanum fekk dreingirnar at semjast; men tað var so verri enn so. Tvørturímóti versnaði støðan teirra millum. Teir orkaðu ikki at hugsa um,

at teir tey komandi árini skuldu halda á at arbeiða saman. Teir høvdu tí gjørt av, at tá ið pápin doyði, skuldu teir fara hvør til sín. Meðan pápin lá á deyðastrá, hugsaði og hugsaði hann um, hvat ið gerast kundi at fáa dreingirnar at semjast.

Bíblian sigur, at um onkrum fattast vísdóm, tá skal hann biðja Gud, sum gevur øllum gjarna og uttan átalur (Ják. 1,5). Vit hava altso fría atgongd til náðitrónuna at biðja um vísdóm. Sigur Gud so við okkum: „Nei, nú biður tú um ov nógv!“ Nei, tað stendur, at hann gevur okkum gjarna, tað vil siga við gleði og uttan átalur, sum merkir, at hann hevur ikki at okkum.

Brádliga visti pápin, hvat ið hann ætlaði sær at gera, og hansara hugskot, tykir mær, var líka gott, sum vísdómur Sálomons á sinni, tá ið hann fann útav, hvør ið var rætta mamman hjá pinkubarninum.

Pápin læt skriva eitt arvabræv. Í arvabrævinum stóð skrivað, at báðir dreingirnir skuldu arva tey tvey hundrað túsund pørini av skóm, sum vóru í skóbúðini, soleiðis, at annar skuldi arva tann høgra og hin tann vinstra skógvin av hvørjum skópari.

Hetta kom heilt óvart á synirnar, men tað fekk ta ætlaðu ávirkan á teir. Teir samdust, og alt klandrið helt uppat. Hvørja ferð teir seldu einar skógvar, var vinningurin hin sami hjá báðum.

Øll bløðini í Buenos Aires skrivaðu um hesa hending, og tað fekk fólk at streyma til skóbúðina, so sølan og harvið vinningurin vaks stórliga. Minst nú til, tú kanst biðja Gud um vísdóm.

*Effie Campbell.*

---

Lovprísan er sum eitt lesiglas (forstørrilsisglas). Tað hjálpir tær at síggja, at Gud er størri enn tínir trupulleikar. So flyt eyguni yvir á Gud! Staðin fyri at dvølja við tínar trupulleikar og falla í fátt, loysir tú tína trúgv og fert undir at leita eftir loysnum hjá Gudi. Eitt trúgvandi hjarta fær hesar loysnir skjótari enn eitt ivandi hjarta.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9. juni | **Tekstur:** | Áps. 4,1–20 | **Bíbliuorð:** | Áps. 4,20 |
| 16. juni | **Tekstur:** | Áps. 8,26–40 | **Bíbliuorð:** | 1 Tim. 2,4 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74